


*Glaðir skúlanæmingar úr 6. flokkunum á Venjingarskúlanum og á Nr. Nissumskúla í Norðurjútlandi hittast uttan fyri skúlan á Frælsinum. Mynd jan*

# Skúlabørn úr Nr. Nissum á spennandi Føroyavitjan

Jan Müller

Tað var tann tíð, tá skúlabarnaferðir vóru gerandiskostur her á landi - oftast vóru tað føroyskir skúlanæmingar, sum vitjaðu danskar skúlaflokkar. Og mong eru tey, sum í dag eru tilkomin, ið hava góð minni frá hesum skúlabarnaferðunum. Ja, fyri nøkur teirra bleiv talan um eitt vinarlag og kennskap fyri lívið.

Men eisini í dag er tað so, at føroyskir skúlanæmingar fara til Danmarkar og síðani sjálvir fáa vitjan av donsku skúlanæmingunum teir hava búð hjá og verið saman við.

Tað eru 6b á Venjingarskúlanum og 6. flokkur á Nr. Nissumskúla í Lemvig kommunu í Norðurjútlandi eitt gott dømi um. Eftir at hava skrivað og samskiftað á e-mail í fleiri mánaðir varð so farið at skipa fyri tiltøkum av ymsum slag og umsóknir vórðu sendar grunnum um stuðul til ferðina. Og úrslitið varð, at teir umleið 24 næmingarnir í 6b herfyri fóru við flogfari til Danmarkar. Leiðin gekk fyrst til Billund, síðani víðari norðureftir til Lemvig, har skúlanæmingar í Nr. Nissumskúla, foreldur og lærarar tóku ímóti. Vitjanin í Danmark var sera væleydnað, og kanska ikki minst tí at veðrið var so gott allar dagarnar. Hitin var upp í 20-25 stig flestu dagarnar. Undir vitjanini høvdu føroysku skúlabørnini høvi til at síggja og vitja ymisk pláss í Lemvig umframt at tað eisini varð farið til Århus, har m.a. Den gamle By og Tivoli vóru á skránni.

### Donsku børnini til Føroya

Mánadagin kom so túrurin til 6. flokk á Nr. Nissumskúla. Eftir flúgvitúrin úr Billund hittust føroysku og donsku børnini úti á Frælsinum, har „gensynets glæde" var stór. Tá tey høvdu hálsfevnt hvør annan varð farið heim til føroysku børnini.

Eins og í Danmark varð eisini gjørd ein áhugaverd og fjølbroytt skrá fyri vitjanina. Fyrrapartin týsdagin gekk leiðin út á Frímerkjadeildina, har bæði donsku og føroysku skúlabørnini sluppu at síggja, hvussu fólkini arbeiða við eini av teimum mest týðandi føroysku útflutningsvørunum aftaná fisk, nevniliga tey sera vøkru føroysku frímerkini. Tey fingu so eisini við sær frímerki og tilfar um frímerkini. Og her eigur Frímerkjadeildin rós uppiborið. Tey hava greitt úr hondum eitt órúliga vakurt og upplýsandi tilfar um frímerkju okkara, og harvið eisini um mentan og søgu okkara.

Seinnapartin varð farið við Rituni til Nólsoyar at vitja fuglastapparin í oynni, sum múlabant børnini við síni áhugaverdu frágreiðing um mongu føroysku fuglarnar. Og eingin sjóferð uttan at koyra dorgina út. Hóast oysandi regn allan dagin, so varð hetta kortini ein stór uppliving fyri donsku skúlabørnini.

Og soleiðis verður hildið fram alla vikuna. Mikudagin varð vitjað í Eysturoynni, og tá var bakandi sól. Leiðin gekk til Tjørnuvíkar, Eiðis, Gjáar og Gøtu. Hósdagin varð vitjað á Fómís og á Sosialinum á Argjum.

Í dag eru løgtingið, Tinganes og Skansin á skránni umframt túrur undir Vestmannabjørgini og víðari til Pollin í Saksun. Men eingin Føroyavitjan uttan eisini at leggja leiðina til Kirkjubøar.

Leygardagin verður farið til gongu um reynið til Kirkjubøar, har børnini verða víst runt. Men stóra ynski teirra at hitta og síggja Trónda Patursson kundi ikki koma við á skránna á hesum sinni. Heimskendi listarmaðurin er nevniliga á ferð í útlandinum.

Hetta er tíðin, tá sendiharrar og ráðharrar vitja í Føroyum. Slíkar vitjanir fáa oftani drúgva umtalu í fjølmiðlunum. Men vit eiga ikki at undirmeta týdningin av skúlabarnavitjanum sum hesi. Tær hava í mongum førum uppiborið eins góða umrøðu.

Sum eisini sæst á skránni er ein skúlabarnavitjan sum henda bæði til gaman og álvara. Endamálið við slíkum floksskifti millum lond er m.a. at fremja norðurlendska medvitið. Vit hava øll ein felags arv, sum m.a. sæst aftur í norðurlendskum samstarvi. Annars er endamálið við slíkum ferðum eisini at skilja mótsetningar og líkheitir millum føroyingar og danir, at betra um málkunnleikan hjá næmingunum og at venja næmingarnar í brúki av kunningartøki. Í hesum sambandi hava næmingarnir, áðrenn umbýti fór fram, havt høvi at samskifta um internetið. Ætlanin við slíkum ferðum er so haraftrat, at lærarar á skúlunum, bæði í Danmark og Føroyum, skulu kunna næmingarnar um serstøk mentunarlig, geografisk og vinnulig viðurskifti, møguliga í sambandi við eina evnisviku.

Vónandi hevur hetta eins og onnur skúlabarnaumbýti verið við til at menna forstáilsi millum skúlabørn í Føroyum og Danmark - fyri hvørjum øðrum og fyri báðum londunum.



*Eftir at føroysku skúlabørnini høvdu verið eina viku í Danmark komu donsku næmingarnir mánadagin til Føroya, og her síggja vit teir hálvfevna føroysku floksfelagarnar. Mynd jan*



# Royndur og dámligur sendiharri á vitjan

*Hesa vikuna hevur nýggi norski sendiharrin í Danmark, Dagfinn Stenseth vitjað í Føroyum. Nýggi ferðastjórin, sum hevur hitt sendiharran, heldur, at valið av sendiharra vera sera heppið*




*Lógvatak fyri øktari samvinnu millum Føroyar og Noreg. Stjórin í Ferðaráðnum, Heri Niclassen hittir norska sendiharran í Danmark, Dagfinn Stenseth. Mynd jan*

Jan Müller

Hesa vikuna hevur nýggi norski sendiharrin í Danmark, Dagfinn Stenseth og konan Raili vitjað í Føroyum. Sendiharrin tók við nýggja starvinum í fjør, og hetta er fyrsta vitjan hansara í Føroyum. Undir vitjanini hevur sendiharrin hitt løgmann, varaløgmann, oljumálaráðharran umframt umboð fyri vinnuna og ymsar stovnar.

Norski sendiharrin nýtti týsdagin høvi til at støkka inn á gólvið í Ferðaráðnum á Kongabrúnni. Har hitti hann nýggja stjóran í Ferðaráðnum, Hera Niclassen.

Hetta er fyrsta almenna vitjanin á Ferðaráðnum, síðani nýggi stjórin tók við og hevur hann bert góð orð at bera sendiharrahjúnum. - Eg kann bert siga, at hetta eru sera dámlig fólk. Sendiharrin sjálvur er sera vitugur maður, sum hevur drúgvar royndir í sendiharrayrkinum. Hann hevur verið sendiharri í Ruslandi í 14 ár, tvs. at hann var sendiharri bæði tá Gorbatjov kom til og tá Sovjetsamveldið skrædnaði sundur sigur Heri Niclassen, sum serstakliga beit merki í tann ovurstóran áhugan sum norski sendiharrin hevur í Føroyum og ikki minst føroyskari ferðavinnu.

Hann frøddist serliga um, at Smyril Line hevur eina rutu til Bergen og Atlantic Airways eina rutu til Stavanger. Hann lovprísti Smyril Line og vónaði, at tað fór at ganga væl við tí nýggja skipinum.

Sjálvur vónar nýggi ferðavinnustjórin, at ein slík vitjan kann vera við til at menna samvinnuna millum Føroyar og Noreg. -Hetta er so fyrsti sendiharrin, ið vitjar á Ferðaráðnum, sum eg tók við starvinum. Eru allir sendiharrar líka vinarligir, skilagóðir og dámligir sum hesin, so lovar tað væl fyri samvinnuna millum Føroyar og onnur lond og her vónandi eisini fyri føroyska ferðavinnu leggur Heri Niclassen aftrat.

### Jens Stoltenberg til Føroya

Eisini Anfinn Kallsberg, løgmaður ynskir nýggja norska sendiharranum í Danmark vælkomnum til Føroya. Nú hava Føroyar og Noreg sum samvinnu á mongum økjum, men hann heldur, at møguleikar áttu at verið at ment samvinnuna á tí nýggja oljuvinnuøkinum eisini. Sjálvur vitjaði løgmaður Noreg í fjør, og tá hevði hann m.a. høvi til at hitta fleiri ráðharrar og eisini ein oljupall. Undir vitjanini beyð hann táverandi norska forsætisráðharranum at vitja í Føroyum. Nú hevur so Jens Stoltenberg tikið við forsætisráðharrasessinum, og hann hevur boðað frá, at hann fegin vitjar í Føroyum, men tað verður ikki sum ætlað í heyst. Jens Stoltenberg skal finna eina tíð, ið er hóskar inn í hansara arbeiðsskrá.

Norski sendiharrin vitjaði í Oljumálastýrinum mikudagin, har hann m.a. hitti Eyðun Elttør, landsstýrismann. -Vit nýttu høvi at tosa um gongdina í øllum oljumálinum og var serstakur dentur lagdur á útbjóðingina. Hóast vit ikki tosaðu um nakað ítøkiligt, so havi eg kortini vónir um, at føroyingar og norðmenn kunnu arbeiða saman á oljuøkinum, nú henda vinnan skal byggjast upp. Tað er eingin loyna, at nettupp norðmenn hava drúgvar royndir á økinum, og vónandi kunnu vit læra av teirra royndum sigur Eyðun Elttør, sum vísir á tað góða samstarvið, ið longu hevur tikið seg upp á útbúgvingarøkinum.

### Nógv ár í Moskva

Dagfinn Stenseth er lættvektari í sendiharrayrkinum. Hann hevur arbeitt fyri norsku uttanríkistænastuna síðani 1960. Í árunum frá 62 til 65 var hann attaché á sendistovuni í Moskva, frá 65 til 69 var hann skrivari í Uttanríkisráðnum, frá 69 til 72 var hann sendiharraskrivari í Bonn, frá 73 til 78 varastjóri í Uttanríkisráðnum, síðani sendiharri í Moskva og Ulan Bator í Mongolia frá 79 til 85, frá 85 til 90 politiskur samskipari og avgreiðslustjóri í Uttanríkisráðnum, frá 90 til 94 aftur sendiharri í Moskva somuleiðis fyri Ulan Bator, Tbilisi, Alma-Ata, Bisjkek, Tasjkent, Askhabad og Jerevan, frá 94 til 97 sendiharri í Finlandi, frá 97 til 99 serráðgevi í Uttanríkisráðnum og frá 99 sendiharri í Danmark.

Seinasta dagin á vitjanini hitti sendiharrin stjóran í Føroya Banka, hann vitjaði eisini í Norðurlandahúsinum og í Listaskálanum.

# Bretsk útbjóðing seinkað í hálvt ár

Jan Müller

Tann 19. útbjóðingin á bretskum øki verður helst seinkað í eitt hálvt ár aftrat. Orsøkin tykist vera tann, at stjórnin enn ikki hevur fingið umhvørviskrøvini til oljuleiting á Atlantsmótinum uppá pláss. Hetta skrivar skotska blaðið Press and Journal. Ein tals maður fyri DTI sigur, at teir hava undirmett tíðina tað tekur til at seta í gildi nýggju umhvørviskrøvini.

Sambært skotska blaðnum so fer seinkingin at hava ávirka leitingina í tí sokallaða Hvíta økinum, sum við marknaavtaluni við Føroyar gav Bretlandi eitt stórt nýtt øki at leita eftir olju á. Tað var eisini hetta økið, sum bretski oljuídnaðurin peikaði á, tá hann legði trýst á myndugleikarnar um at fáa eina skjóta avtalu við Føroyar um markið.

Meðan hetta ikki fer at fáa nakra avleiðing fyri verandi leiting í økinum og heldur ikki nógv umrøddu boringina hjá ExxonMobil nær markið, har tað skilst, at felagið hevur gjørt eitt stórt gassfund, so kann seinkanin fáa avleiðingar fyri virksemi og tilrættaleggingina hjá oljufeløgunum uppá eitt sindur longri sikt.

Útbjóðingin av økjunum nærhendis føroyska markinum hevur longu verið útsett í eina tíð, og tí kemur henda nýggja útsetingin ikki væl við hjá oljufeløgunum ella bretska oljuídnaðinum. Tað er stigið hjá Greenpeace at fara í rættin við stjórnini um nettup umhvørviskrøvini til nýggja oljuleiting, sum er orsøkin til seinkanina.

Spurningurin er, hvørja ávirkan ein slík seinking av leiting í bretskum øki kann fáa fyri virksemi á føroyskum øki. Keldur, sum Sosialurin hevur tosað við, eru ójavnar á máli. Ein sigur, at hetta er óheppið fyri føroysku útbjóðingina, tí tað ger, at tað verður minni seismiskt virksemi í Hvíta økinum. Ein onnur kelda heldur tað kann vera gott fyri Føroyar, tí nú verður so alt fokuserað uppá føroyska landgrunnin.

ALT TIL SEYMING Á EINUM STAÐ

Vit hava beint nú fingið ein hóp av nýggjum vøkrum bondum og øðrum at seta upp á klæðir.
Eisini nýggjar knappar og mangt annað.

NERVØST VELOUR
BERT kr. 39,- pr. m.

TOY TIL FØROYSKT SKJÚRT
140 cm. br. kr. 990,- pr. m.

BUKSUVAÐMAL
150 cm. br. kr. 234,- pr. m.

SVØRT ELASTIKBELTIR
5 cm. br. kr. 87,- pr. m.
4 cm. br. kr. 70,- pr. m.
3 cm. br. kr. 65,- pr. m.

Sosialurin - 311820

Annars hava vit vanliga alt sum tú skalt brúka til seymingina. Kom inn og síggj!

SP/F MARJUN HEIMÁ
C. Ployensgøta 4 • 100 Tórshavn
Tel. 31 25 31 • Fax 31 23 19